# Heilt avgerandi at nýggi Smyril siglur fleiri túrar

**Nýggi Smyril verður neyvan nøkur kollvelting fyri Suðuroynna. Tað heilt avgerandi er, at hann fer at sigla fleiri túrar, enn hesin ger, sigur Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Góð samfersluviðurskiftini hava týdning bæði bæði fyri tann einstaka og fyri fyritøkur og stovnar, sigur Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingur*

– Nýggi Smyril verður heilt avgjørt ein bati fyri Suðuroynna. Men hann verður neyvan nøkur kollvelting í sær sjálvum.

Á evnisdegi um samferðsluviðurskifti í Suðuroy, var Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingur, inni á, hvønn týdning samferðslan hevur fyri eitt øki.

Og hann ivaðist ikki í, at nýggi Smyril verður heilt avgjørt ein munandi bati á Suðuroyarleiðini.

– Hann siglur skjótari og tekur nógv fleiri bilar og farm, enn hesin ger og tað fer at geva Strandferðsluni nógv størri frælsi, tá ið ferðaætlanin skal leggast og sostatt verður eisini tænastan verður harvið betri.

– Men tað, sum er heilt avgerandi, er, at nýggi Smyril fer at sigla fleiri túrar ímillum Suðuroynna og Havnina.

– Og tað krevur meiri pening!

### Fleiri í tænastuvinnuna

Hann vísti á, eisini her hjá okkum er gongdin tann, at alsamt fleiri fólk atbeiða við at veita privatar og almennar tænastur

– Menningin og útbreiðslan av samskiftis- og kunningartøkni er øgilig. Í dag eru uml. fýra fartelefonir fyri hvørjar fimm føroyingar og internet verður alt meiri vanligt.

– At samskiftismøguleikarnir batnað, hevur við sær, at alt gongur nógv skjótari í dag. Men tað ger eisini, at samferðslan er ikki altíð er so neyðug, tí tað ber til ber at búgva eina staðni og veita tænastur til onkran, sum býr eina heilt aðrastaðni.

– Hetta gevur útjaðarasamfelagnum ávísar møguleikar, tí tað ber í sær, at fólk kunnu búgva í útjaðaranum og kortini vera knýtt at arbeiðsplássum í miðstaðarøkinum.

Hann vísti eisini á, hvussu nógv samferðslukervið er bygt út. Hetta hevur havt við sær, at føroyska oyggjasamfelagið ikki longur er eitt land við nógvum lutfalsliga isoleraðum bygdum har gerandislívið í stóran mun fór fram innanfyri bygdamørkini.

– Íløgurnar í vegir, byrgingar, tunlar, og nú undirsjóartunlar, eru í ferð við at broyta hesa myndina grundleggjandi. Nú hava 75% av føroyingum vegsamband við hvønn annan. Og tá ið tunnilin um Leirvíksfjørð verður liðug í 2006, verða tað 85% av fólkinum, sum hava hendan møguleikan.

Hesi seinnu árini eru fólk eisini byrjaði at tosa um at binda Sandoynna og Suðuroynna í hetta kervið.

– Men áðrenn hetta verður veruleiki, kemur ein annar munandi bati á Suðuroyarleiðini. Og er hetta nýggi Smyril sum kemur seinni í ár.

Men Bjarni Mortensen vísti á, at hóast hesa gongdina, eru samferðslu- og samfersluviðurskiftini framvegis av alstórum týdningi.

– Samferðslu- og samskiftisviðurskiftini eru ein grundleggjandi fortreyt fyri menning. Og hetta er ein fortreyt, sum tykist at gerast alsamt meiri týdningarmikil.

Og týdningurin er bæði bæði fyri tann einstaka og fyri fyritøkur og stovnar.

– Fyri fólk sum búgva uttanfyri meginøki eru samferðslumøguleikarnir avgerandi fyri, hvussu stóran og fjølbroyttan arbeiðsmarknað tey kunnu gerast partur av uttan at flyta bústað.

– Í dag ætla øll ung at fáa sær eina útbúgving, tí tey meta at hetta er vegurin til tað góða lívið. Tá ið tey hava tikið útbúgvingina, vænta tey sjálvsagt eisini at kunna brúka hana. Og tá er tað ein stórur fyrimunur at hava atgongd til ein so fjølbroyttan arbeiðsmarknað sum til ber.

– Samfersluviðurskiftini hava eisini stóran týdning fyri, hvussu nógv frítíðartilboð fólk í útjaðaranum hava møguleika at brúka. Og hetta hevur ávirkan á trivnaðin. Til dømis hevur samferðslan alstóran týdning fyri ítróttarlívið og setir karmarnar fyri, hvussu lætt tað er at fáa ítróttin at rigga runt um landið. Langa ferðatíðin, saman við ferðaætlanini, hevur t.d. við sær at ítróttarfólk í Suðuroynni brúka sera nógva tíð í samband við dystir og kappingar.

– Fyri stovnar, og serliga fyritøkur, hevur samferðslan heilt avgerandi týdning. Samferðslan setir fyrst og fremst í stóran mun karmarnar fyri, hvussu smidlig tann einstaka fyritøkan hevur møguleika at vera. Samferðslan ávirkar møguleikarnar fyri tilgongd av rávøru og avskipan. Umframt hetta, hevur samferðslan eisini ofta ávirkan, tá ið tænastur skulu keypast. Tað kann vera í samband við at seta tol upp og at røkja tey.

Somuleiðis hevur samferðslan eisini sera stóra ávirkan kostnaðarstøðið hjá einstøku fyritøkuni og hetta er nakað, sum fyritøkurnar í Suðuroynni merkja sera væl!

– Eitt annað, sum hevur rættiliga stóra ávirkan á møguleikarnar hjá einstøku fyritøkuni at mennast, eru fortreytirnar fyri at luttaka í fakligum umhvørvum aðrastaðni, t.d. á skeiðum, fundum, ráðstevnum og nevndararbeiði.

– Tað er týdningarmikið at luttaka í tílíkum javnan. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst at hetta gevur møguleika halda seg dagførdan um við hvat hendir og hvat er á veg.

– Men tað at luttøka í fakligum umhvørvi, hevur eisini sera stóra ávirkan á, hvørji netverk tann einstaki, og sostatt eisini fyritøkan og stovnurin, fáa atgongd til. Hetta kann hava týdning fyri, hvussu væl viðkomandi fær ávirka tær avgerðir, sum skulu takast, ella tá ið bíleggingar skulu fáast til vega.

Bjarni Mortensen segði, at støðan hesum viðvíkjandi er ikki serliga góð hjá suðuroyingum.

– Skal ein suðuroyingur á ein fund í Havn, sum tekur 2 tímar, má hann vera burtur ímillum 7 og 15 tímar, frá tí at hann fer av Drelnesi og til, hann er aftur.

– Afturat hesum kemur so ferðatíðin innanoyggja ímillum bústaðin í Suðuroynni og Drelnes, sum er ferjulegan hjá Smyrli, umframt møguligar seinkingar í ferðaætlanini.

– Og hetta er væl at merkja, tá ið fundurin verður lagdur soleiðis, at hann passar suðuroyinginum so væl sum tilber.

Smyril siglur bara tvær ferðir um dagin og tað hevur rættiliga nógva spilltíð við sær, tá ið ein suðuroyingur skal eitt ørindi í Havn ella aðrastaðni í Føroyum.

### *Hvussu langa tíð krevur tað at luttaka á einum fundi uppá 2 tímar?*

| | Mánadag | Mikudagur | Fríggjadagur |
|---|---|---|---|
| Av Tvøroyri við Smyrli | 06.00 | 07.00 | 06.00/07.00 |
| Aftur á Tvøroyri | 21.15 | 14.45 | 13.41 (við tyrluni) |
| Tíðarnýtsla | 15 t. og 15 min. | 7 t. og 45 min. | 7.t. 40 min./ 6 t. 40 min |

*Skal ein suðuroyingur til Havnar á einum fund, sum varar í tveir tímar, skal hann vera heimanífrá í minst sjey tímar og ofta má hann vera burtur í 15 tímar. Og tá skal fundurin harafturat aloftast leggjast so, at hann passar suðuroyinginum best, men tað er verri enn so altíð støðan*



# Suðuroyingar mugu ganga plankan út

**– Eg kundi væl hugsa mær at lagt uppskot fram um at sett almenn tiltøk verk fyri gongd aftur á vinnulívið í Suðuroy – men ikki fyrrenn øll oyggin verður ein kommuna, sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum**

KOMMUNU-VIÐURSKIFTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hesir tríggir politisku oddamenninir høvdu leitað sær á samferðslufund í Suðuroy seinasta leygardag. Jógvan við Keldu fremst, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í miðjuni og Johan Dahl, løgtingsmaður*

– Suðuroyggin má verða ein kommuna.

Tað heldur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálum, sum eisini umsitur kommunumál.

Hann sigur, at tað verður neyðugt hjá suðuroyingum at standa meiri saman enn teir gera.

– Tað hevði verið fantastiskt at sæð suðuroyingar sligið seg saman í eina kommuna, sum kundi staðið saman vinnuliga, mentanarliga og politiskt og búskaparliga.

Landsstýrismaðurin vísur eisini á tað serstakliga stóra arbeiðsloysið, sum er í Suðuroynni, har tað er nógv størri enn í Føroyum annars.

Fleiri ferðir hevur verið víst á, at vinnulívið í Suðuroy er so niðurundirkomið nú, at tað er neyðugt, at almenn tiltøk verða sett í verk fyri at fáa gongd á aftur.

Men landsstýrismaðurin heldur, at tað kann ikki verða, uttan so, at øll Suðuroyggin verður løgd í eina kommunu.

– Er støðan í Suðuroy so vánalig, at tað er neyðugt við almennum tiltøkum fyri at fáa oynna á føtur aftur, kundi eg væl hugsa mær at sett uppskot fram um tað, so at landið kundi hjálpt til at fingið gongd á aftur.

– Tað hevði eg ongar trupulleikar havt við- men bara um Suðuroyggin leggur saman í eina kommunu, leggur hann afturat.

Hann sigur, at tað er ikki nóg mikið, at Suðuroyingar hava fingið ein felags samferðslubólk.

– Suðuroyingar mugu samstarva á øllum økjum. teir mugu ganga plankan út, sigur hann.

### Sleppa undan yvirskiping

Jógvan við Keldu heldur, at sum er, stendur Suðuroyggin alt ov spjødd til at fáa fulla nyttu burturúr tí fíggjarliga og menniskjansliga tilfeinginum.

– Skal Suðuroyggin upp aftur á sama støðið sum onnur stór øki í landinum, verður tað neyðugt at skapa eitt samfelag í Suðuroy.

Hann sigur, at tá ið fólk hugsa um, hvar tey skulu seta búgv, velja tey ikki bara eftir einum arbeiðsplássi.

– Tey hugsa eisini um hvussu virkið mentanarlívið er, hvørji tilboð eru á sosiala økinum og, hvørjir frítíðarmøguleikar eru í økinum.

– Fyri at fáa meiri gongd á øll hesi viðurskifti í Suðuroy, er tað avgerandi neyðugt at skipa Suðuroynna í eina kommunu.

Hann sigur, at 20. øld varð merkt av, at kommunur fóru sundur. Úrslitið av tí hevur verið, at landið hevur sett pening í nógvar havnir og lendingar, skúlar og aðrar útbyggingar alla møguliga staðni.

– Hinvegin er 21. øld týðiliga merkt av samanlegging. Tað er rákið og tann, sum ikki er rekur við, hann verður afturútsigldur. Men hví skulu kommunur leggja saman. Kommunur siga, at tær samstarva við aðrar kommunur og at tað gongur fínt?

– Styrkin við at leggja Suðuroy í eina kommunu, er,a t so slepst undan stríði um, antin ein skúli, ella ein havn skal byggjast í einari bygd ella eini aðrari bygd, tí tá er alt ein felags kassi. Tað slepst eisini undan at fleiri sama slag útbyggingar verða gjørdar í grannakommunum.

Jógvan við Keldu sigur, at verður Suðuroyggin ein kommuna, verða tær ymsu útbyggingarnar gjørdar, har tær liggja best fyri og tað slepst undan fleiri sama slag verkløgum á sama øki. Sostatt slepst eisini undan, at eitt øki verður yvirskipað á nógvum økjum. tvørturímóti verða havnir, skúlar o.a. bygt, har tað liggur best.

Hann sigur, at verður Suðuroyggin ein kommuna, verður ein yvirskipað byggiætlan gjørd fyri alt økið. Í løtuni ger hvør kommuna sína byggiætlan og tað er ikki at gagnnýta tilfeingið á fullgóðan hátt. Eitt er, at tað er dýrt at byggja, men tað er sanniliga eisini sera dýrt at røkja øll hesi verkløgini, sum eru bygd allastaðni.

Sjálvur ivast hann ikki í, at tað verða bara nøkur heilt fá ár, so verður vanligt at hugsa soleiðis.

Hann nevnir økið norðast í landinum sum dømi, har hann kennir viðurskiftini sjálvur.

Har hevur verið tosað um at leggja Klaksvík, Leirvík og Fuglafjørð saman.

– Hevði tað verið, høvdu vit sloppið undan víðari kjaki um, antin skúlar skulu byggjast í Kambsdali ella í Klaksvík. Teir verða bygdir, har teir liggja best.

– Tað fer at gera, at peningurin verður brúktur rætt og tað fer aftur at føra ein heilt annan dynamikk í alt økið.

### Smábygdirnar hvørva kortini

Jógvan við Keldu er heldur ikki samdur í sjónarmiðinum um, at tær smáu kommunurnar fara at drukna, verða tær lagdar saman við størri kommunur.

– Tær smáu bygdirnar hvørva kortini. Gongdin á smábygd hevur í fleiri ár verið tann, at fólkatalið minkar alsamt.

Summi stúra eisini fyri, at tær smáu bygdirnar verða sovibýir hjá teimum størru bygdunum.

– Men hvat so, spyr landsstýrismaðurin. Hvat eru tær smáu bygdirnar í dag?

Hann sigur, at verður Suðuroyggin løgd saman í eina kommunu, kann han nsjálvsagt ikki tryggja, at tær smáu bygdirnar fara at blomstra.

– Men tað er í hvussu so er greitt, at tað búskaparliga grundarlagið at halda lív í bygdunum verður heilt munandi størri. Tann fyrimunurin verður í øllum førum hjá smábygdunum og sostatt hava tær nógv størri møguleika at hóra undan í einari stórkommunu, leggur hann afturat.

Hann nevnir, at ein útbygging upp á eina millión í eini smábygd, kann verða ein ómøgulig uppgáva hjá eini lítlari kommunu, men tað er ikki serliga nógv hjá eini stórari kommunu.

## Skulu ikki vænta hægri játtan til nýggja Smyril

**– Tað verður ómetaliga trupult at fáa meiri pening til Suðuroyarsiglingina, so at nýggi Smyril kann sigla fleiri túrar. Men hann kann sigla 3-4 túrar afturat um vikuna, uttan at koma í manningartrupulleikar**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað verður ikki lætt at hækka játtanina til Strandferðsluna næsta ár.

Tað sigur Jógvan við Keldu aftaná evnisdegin, sum var í Suðuroy seinasta leygardag um samferðsluna til og úr oynni.

Jógvan við Keldu sigur, at fíggjarliga støðan í landinum er ikki tann besta í løtuni og sostatt eru heldur ikki útlit fyri, at játtanin til Strandferslsluna fer at hækka.

Tann 5. juli verður Strandferðslan løgd undir Jógvan við Keldu at umsita.

Og á evnisdegnum varð ført fram, at nýggi Smyril verður eitt stórt framstig fyri Suðuroynna, men at hann verður neyvan nøkur kollvelting í sær sjálvum.

– Tað er alt avgerandi, at nýggi Smyril fer at sigla fleiri túrar, sigur Bjarni Mortensen, samferðslufrøðingur í aðrari grein her í blaðnum.

### Kann sigla 3-4 afturat meir um vikuna

Jógvan við Keldu sigur, at á evnisdegnum varð upplýst, at nýggi Smyril kann sigla 3-4 túrar afturat um vikuna, uttan at spreingja sáttmálarnar, sum manningin hevur um arbeiðstíð.

Men sum støðan er nú, skulu suðuroyingar ikki seta nøsina upp eftir ov nógvum.

Tað var Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sum upplýsti á evnisdegnum, at nýggi Smyril siglur so mikið skjótari enn Smyril ger nú, at nýggi Smyril fer at brúka einar 14 tímar færri um at siga sama túratal, sum Smyril ger nú um vikuna.

– Fyri hesar 14 tímarnar, kann nýggi Smyril sigla einar 3-4 túrar fleiri um vikuna, uttan at spreingja karmarnar hjá manningini viðvíkjandi vaktarætlanini.

Men tað kostar sjálvsagt olju og aðrar útreiðslur, so spurningurin er um pláss verður fyri fleiri túrum, uttan at játtanin hækkar.

– Skal nýggi Smyril sigla meiri enn hesar tríggjar, fýra túrarnar afturat, kemur Strandferðslan í manningartrupulleikarnar, tí so verður farið útum sáttmálatreytirnar hjá manningini.

Verður farið upp um tað loftið, fer tað at krevja eyka manning, soleiðis sum sáttmálarnir nú eru.

Men tað er eisini greitt, at skal nýggi Smyril sigla 3-4 túrar afturat um vikuna, mugu teir leggjast so, at tað passar inn í vaktarskipanina og tað kann seta krøv til ferðaætlanina.

Men stjórin á Strandferðsluni segði, at nú stovnurin er farin at leggja rakstrarætlan fyri komandi á, verður fyribils arbeitt útfrá at sama ferðaætlan verður galdandi næsta ár, sum í ár.

– Men spurningurin um túratalið verður endurskoðaður, legði hann afturat.



*Nøkur fólk høvdu leitað sær á evnisdag í Øravík seinasta leygardag at tosa um amferðsluna til og úr Suðuroy. Tey fingu at vita, at nýggi Smyril kann sigla einar 3-4 túrar fleiri um vikuna innanfyri somu karmar sum nú*